

Kári Reynheim

## Holst skal spæla á miðvøllinum

Kári Reynheim heldur, at Christian Lamhauge Holst prógvaði í landsdystinum móti Norðurírlandi, at Holst skal spæla sum framrættaður miðvallari á føroyska landsliðnum. – Hann er tryggur við bóltinum og dugir væl at halda honum, meðan føroyska liðið flytir seg fram á vøllin. Eg havi ongantíð skilt, hví Brian Ker hevur brúkt hann sum vong. Tað hevur ofta loyst betur, at Holst bara var eftir í Danmark, tá hann hevur spælt í høgra borði. Hann prógvaði móti Norðurírlandi, hvar hann skal spæla, sigur Kári Reynheim við Rás2. Reynheim skoraði føroyska málið, tá Føroyar spældu 1-1 móti Norðurírlandi í Belfast í 1991.



Christian Lamhauge Holst




Fyrrverandi landsliðsleikarin, Atli Danielsen, stuttleikar sær í Roskilde

# Atli stuttleikar sær í Roskilde

**FÓTBÓLTUR Tað var við reyvini í vatnskorpuni, at FC Roskilde hóraði undan og lívbjargaði sær í næstbestu donsku fótbóltsdeildini í fjør. Sigurin hjá FC Roskilde leygardagin merkir, at nú hevur liðið hjá Atla Danielsen ikki tapt í átta dystir á rað**

Rólant Waag Dam

Eitt brent brotsspark men kortini eitt smíl. Jú, tað er hugaligt at spæla við FC Roskilde, sjálvt um Atli Danielsen sjálvur annar misnýtti brotsspark í dystinum móti Brønshøj sunnudagin.

– Ja, hetta er bara heilt stuttligt fyri tíðina, var stutta, men sigandi staðfestingin frá miðvallarleikaranum úr Klaksvík, eftir dystin. Lítið er at ivast í, at teir í FC Roskilde virðirsmeta góðu gongdina, tí byrjan teirra upp á kappingarárið var alt annað enn ynskilig. Seks dystir skuldu til, áðrenn fyrsti sigurin kom í hús, men síðani hevur tað gingið heilt væl hjá FC Roskilde.

Leygardagin kom fimti sigurin í hús, tá Atli Danielsen og teir bastu uppflytararnar Brønshøj á útivølli. Byrjanin var annars einki serlig, tí FC Roskilde kom aftur um við 1-0 og brendi tvey brotsspark upp í slag.

Fyrst brendi liðfelagi hjá Atla Danielsen, tá lítið var spælt av fyrra hálvleiki. Men FC Roskilde fekk enn eitt brotsspark, tá góðir 20 minuttir vóru spældir. Atli Danielsen, sum tekur sær av fleiri deyðbóltsstøðum hjá FC Roskilde, varð settur at skjóta hesaferð, men málverjin bjargaði. Lukkutíð fyri Atla Danielsen og FC Roskilde, var ein liðfelagi hansara kvikur og skeyt leysa bóltin í netið.

Tað var eisini javnleikur í steðginum, men eftir steðgin fekk FC Roskilde tvey mál aftrat, soleiðis at tað endaði 1-3.

Atli Danielsen, sum spældi samfullar 90 minuttir á miðvøllinum hjá FC Roskilde, hevur nú vunnið tríggjar dystir á rað við liði sínum. Harnæst hevur FC Roskilde ikki tapt í átta dystir. Tað hevur við sær, at teir liggja nummar fimm í deildini, eitt stig aftanfyri FC Vestsjælland, sum tapti í dag og hevur 19 stig.

*rolant@sosialurin.fo*

# Holst roknar við nógvum stigum

**FÓTBÓLTUR – Vit eru munandi betri nú, enn vit vóru fyri einum mánaði síðani og leikliga framgongdin fer uttan iva at tryggja okkum fleiri stig framyvir, sigur Christian Lamhauge Holst, sum misti sigurin í evstu løtu í gjár, men kortini er bjartskygdur**

Rólant Waag Dam

Tríggir sigrar á rað og tann fjórði var á stokkinum. Holst og hinir skuldu bara hála sigurin inn um, men mistu fongin, tá hann var at rokna sum heima. Í orðsins rætta týdningi var tað eisini Holst, sum misti bóltin, ið førdi til álopið, tá Lyngby javnaði í 89. minutti á Lyngby Stadion seinnapartin í gjár.

– Sum partur av einum liði er tað ræðuligt at luttaka í slíkum, og tá eg sjálvur eri beinleiðis partur av tí, er tað uppaftur verri. Tíverri er tað eg, sum missi bóltin, áðrenn Lyngby skorar. Eg eri ørur í høvdinum, so harmur eg eri um hetta, greiðir Christian Lamhauge Holst frá á heimasíðuni hjá Silkeborg.

Føroyski landsliðsleikarin spældi annars dystin á tamb í vinstra borði. Framrættaði miðvallarleikarin vísti góðar taktir móti fyrrverandi felagi sínum, hevði fleiri góðar royndir og onkrar góðar sendingar. Seks minuttir fyri leiklok var um reppi, at Christian Lamhauge Holst avgjørdi dystin, men hann var ikki eins kaldur sum móti Norður Írlandi, og misnýtti annars fína møguleikan at økja um leiðsluna til 0-2.

Fáar minuttir seinni misti Holst bóltin í álopsspæli, Lyngby gjørdi skjótt av og so var 1-1. Soleiðis lumpaðu uppflytararnir seg til eitt stig og hetta iðra teir í Silkeborg seg um, heldur enn at frøast yvir, at liðið ikki hevur tapt fimm teir seinastu dystirnar.

### Frá Camp Nou til Silkeborg

Eftir at vónbrotið um mistu stigini hevði lagt seg í gjár, dugdi Christian Lamhauge Holst eisini at síggja tað positiva.

– Vit eru munandi betri nú, enn vit vóru fyri einum mánaði síðani og leikliga framgongdin fer uttan iva at tryggja okkum fleiri stig framyvir, sigur Christian Lamhauge Holst. Hann vónar, at fyrstu stigini verða tikin longu sunnudagin, tá ótrúliga sterka oddaliðið FCK kemur á vitjan í Silkeborg.

Havandi í huga seinasta dystin millum júst hesi bæði liðini, er tað ikki ein ógjørlig uppgáva. Silkeborg spældi 2-2 javnleik í Parkini fyri einum góðum mánaði síðani, men síðani tá hevur FCK víst nærum ræðandi styrki – ikki bara í heimligu deildini, men eisini í Champions League, har FCK hevur verið sera væl fyri.

FCK vann sannførandi 5-0 í gjár á OB og eru 13 stig frammanfyri FC Midtjylland, ið eigur ein dyst til góðar. Næsta uppgávan hjá FCK verður í Parkini týsdagin, tá teir vitja á Camp Nou hjá mætu FC Barcelona. Fimm dagar er uppgávan heldur minni eksotisk. Mótstøðuliðið er Silkeborg á Silkeborg Stadion, og tað flenna tey kring felagið hjá Holst nógv eftir.